

www.oljan.fo

**Jan Müller** 29 - 02 - 2012

# Mærsk vil ikki tingast um oljuna í Norðsjónum

Danska stjórnin vil hava meiri pengar burtur úr oljuni og gassinum í Norðsjónum, og hon hevur tí ætlanir um at endurskoða avtaluna um Norðsjóvaroljuna. Í gjár fekk stjórnin stuðul frá vísmonnunum, sum kunngjørdu eina frágreiðing, sum vísti, at stjórnin kann ogna sær ein størri part av avlopinum, og at oljufeløgini framvegis kunnu varðveita ein rímiligan vinning. Men A.P. Møller-Mærsk vil ikki tingast um avtaluna, sum felagið hevur við statin. -Tað verður oyðileggjandi fyri álitið á statin, um avtalan verður broytt, sigur samskiftisstjórin hjá fyritøkuni, Anders Würtzen, í einum tíðindaskrivi. Hann leggur afturat, at avtalan um oljuna í Norðsjónum er eitt úrslit av drúgvum og nágreiniligum samráðingum um, hvussu staturin og oljufeløgini kunnu røkka málunum. Sostatt er A.P. Møller-Mærsk ikki sinnað til at broyta verandi avtalu við tannn danska statin. Í frágreiðingini vísa vísmenninir á, at í Noregi fær staturin 85 prosent av tilfeingisrentuni, meðan tann danski staturin fær 71 prosent. Anders Würtzen skrivar, at hesi viðurskiftini vórðu umrødd, tá verandi avtala varð gjørd í 2003, men at táverandi stjórnin valdi tað lægra skattaprosentið, tí tað varð mett at vera ein fyrimunur við skiftandi oljuprísum. Ein av verandi stjórnarflokkum, Radikali, tók undir við verandi avtalu um Norðsjóvaroljuna, tá hon bleiv endurskoðað fyri níggju árum síðani. Avtalan fer ikki úr gildi fyrr enn í 2042.

